## DAGSINS MEINING

# Hvør eigur LÍV?

Hvør eigur rættin til Føroya Lívstrygging? Føroyskir løntakarar ella Føroya Landsstýri vegna føroyskar tryggingartakarar? Hetta er tann stóri spurningurin, nú fimtan fakfeløg fyrireika eina stevning ímóti landsstýrinum. Fakfeløgini halda, at tað var ein ólóglig ognartøka, tá Føroya Lívstryggin varð umskipað til alment partafelag.

Málið snýr seg bæði um ein eftirlønarspurning, eina ognartøku og eina politiska framferð, sum kanska ikki var ílagi. Fakfeløgini halda fast upp á rættin til LÍV, tí fakfelagslimir eiga 80 prosent av teimum virðum, sum eru LÍV eigur, tí tað eru fyrst og fremst løntakarar, sum eiga lívs- og eftirlønartryggingarnar.

Hesum kunnu tey flestu vera samd um, hóast landsstýrismaðurin, sum tá sat, segði í útvarpssamrøðu, at hetta var landsstýrið tilvitandi um, og var við til at fremja eina umskipan, næstan vegna føroyska løntakaran. Eru vit samd um, at løntakararnir eiga virðini, so kunnu vit helst eisini taka undir við, at fakfeløgini – í samstarvi við t.d. Tryggingarfelagið Føroyar – fáa LÍV til keyps fyri einar 25 milliónir krónur.

Tað er sjálvandi, at fakfeløgini saman eiga sítt egna eftirlønartryggingarfelag. Tey vita, hvat er best og rættast fyri limirnar! Men tá tað er sagt, skal leggjast afturat, at tíverri hava fakfeløg, eins og tað almenna, m.a. tí semja ikki er fingin til eina veruliga loysn, verið eftirbátur, at tryggja øllum føroyskum løntakarum eina veruliga eftirløn. Eina eftirløn, sum partvíst varð grundað á eina samhaldsfasta skipan, og síðani við møguleikum fyri einsæris tryggingum.

Hin parturin í aktuella málinum er framferðin hjá landsstýrinum. Tað er longu eitt sindur síðani, at tað kom undan kavi, at landsstýrið legði ikki við eina løgfrøðiliga frágreiðing, tá Vinnumálastýrið legði uppskotið um tryggingarlóggávuna fyri løgtingið. Frágreiðingin gekk á tað borðið, at sjálvsognarfelagið Føroya Lívstryging var ogn hjá tryggingartakarunum.

Henda spurningin, hesa framferðina, skal Landsstýrismálanevndin kannað. M. a. við atliti til lóg um ábyrgd landsstýrismanna.

Hetta málið er annas aftur eitt dømi um, at stór mál skulu skundast ígjøgnum løgtingið. Tingið fekk bara stutta tíð at viðgera málið, og ein stutt viðgerð er ikki ein nóg dygg viðgerð. Hetta varð eisini orsøkin til, at Javnaðarflokkurin atkvøddi ímótiuppskotinum hjá landsstýrinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Langtíðarætlanir

**Lisbeth L. Petersen,**
*Sambandsflokkurin*



Nú tíðin styttist, til uppskot um fíggjarlóg fyri 2002 verður løgd fyri tingið, frætta vit úr Útvarpi Føroya tey tíðindi, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Karstin Hansen, er farin at fregnast, um andstøðan vil samstarva um eina langtíðar íløguætlan.

Fyrst skal sláast fast, at síðan Sambandsflokkurin hevur fingið nýggja flokksleiðslu, hevur Karstin Hansen ikki sett seg í samband við okkum um hetta mál, men tá hetta er sagt, so er tað rætt, at tá spurningurin var uppá tal seinast, fekk landsstýrismaðurin at vita, at flokkurin ikki var sinnaður at luttaka í hesum arbeiði.

Flokkurin hevur ikki gjørt nakra aðra niðurstøðu, og sostatt stendur tann avgerðin við.

Tá útvarpsmaður seinri spurdi undirritaðu um orsøkina til hesa støðutakan, so var svarið, at flokkurin hevur sínar egnu prioriteringar viðv. íløgum, og at hetta er ein politiskur spurningur, har vit halda okkum til okkara stevnuskrá. At gera eina avtalu um langtíðarætlan við tríggjar flokkar, sum sita nakrar fáar mánaðar aftrat, og sum enn hava meiriluta, vildi onga meining givið. Teir hava jú tikið sera álvarsamar avgerðir um framtíðarstøðu Føroya uttanum andstøðuna, sum gera, at framtíðarvánirnar eru so ógreiðar og ótryggar sum ongantíð fyrr.

Veruligar samráðingar um ríkisveitingina eru ikki byrjaðar enn, og tí vita vit í andstøðuni ikki, hvussu nógv verður at arbeiða við komandi tíðina. Um samgongan veit tað, kunnu vit sjálvandi bert gita. Fíggjarligu møguleikarnir viga tungt í hvørjari støðutakan, og tí skilji eg als ikki fíggjarmálastýrið, sum samb, Útvarpi Føroya hevði ta viðmerking, at langtíðar íløguætlanin og inntøkumøguleikarnir onki høvdu við hvørt annað at gera.

Tað er av alstórum týdningi fyrst at vita, hvussu nógv er at húsast við, áðrenn tú veit, hvussu nógv er til rakstur og íløgur, og fyrst tá kann prioriterast av álvara.

Harafturat hoyrist nú, at samgonguflokkarnir eru týðiliga ósamdir um prioriteringarnar, so hvar er grundarlagið fyri støðutakan til langtíðarætlan ?

Sum nevnt hava vit í Sambandsflokkinum longu nakrar prioriteringar, og okkara stevnuskrá er greið. Tá valið er av, fara vit til verka saman við øðrum við tí endamáli, at føroyingar ikki verða sleptir uppá fjall í fullveldisrúsi, har tey veiku verða tey, sum gjalda prísin.

# Sanghópurinn Sólarmegin í Føroyum

TÓNLEIKAVITJAN
*Tíðindaskriv*

Íslendski sangbólkurin, Sólarmegin av Akranesi, vitjar í Føroyum 12. – 19. juli. Bólkurin kemur higar at halda Vestanstevnu í Sørvági, sum er vinarbýur hjá Akranesi. Eisini er fyriskipað konsert í Listasavni Føroya í havn týsdagin 17. juli klokkan 20.

Í Sólarmegin eru átta sangarar, fýra kvinnur og fýra menn. Sangbólkurin er ein áhugabólkur, men fleiri av limunum hava tónleikaliga útbúgving, bæði í sangi og spæli. Leiðarin, Guðmundur Jóhannsson, sum eisini syngur bass, spælir t. d. við lokala bólkinum, Melasveitin, sum eisini er við til Vestanstevnuna.

Sólarmegin hevur sungið síðani 1990 og givið út eina fløgu. Bólkurin hevur spælt til konsertir nógva staðni í Íslandi og hevur vitjað Danmark, Noreg, Finnland og Svøríki. Reportiorið er tónleikur í øllum sjangrum, frá kirkju- og fólkatónleiki til umskrivingar av populerum tónleiki. Á skránni hesaferð er tónleikur úr Føroyum, Íslandi og Írlandi.

Sangbólkurin hevði tvær konsertir í Íslandi beint fyri Føroyatúrin, og ummælari frá Morgunblaðnum skrivaði 6. juni: »Sólarmegin er ein harmoniskur sangbólkur; tey syngja glitrandi reint og halda áhoyrarunum við fíntfølandi sangi. Vónandi verður bólkurin eins ambitiøsur í framtíðini…«

## Góða Sólborg

Nú tú fer at gevast, vil eg siga tær takk fyri alt. Tú hevur verið ein góður stuðul og hjálp fyri Blákrossheimið.

Vit, sum hava verið búfólk, vilja takka tær fyri tín kærleika, og vit ynskja tær alt tað besta í framtíðini. Jesus signi teg. Tú ert eitt deiligt menniskja.

Sólborg, takk fyri alt!

*Tær kærastu heilsanir,*
**Elma Fornagarð**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Til vildar øllum kann eingi gera

**Eivind Jacobsen**
*Strendur*



Mest beinrakna yvirskrift eg havi skriva, má verða tann um illa lídda sannleikan. Í hvussu so er hevur Helena Dam á Neystabø tikið hana til sín. Viðmerking hennara í Dimmalætting 7/7 líkist mest heilsanum frá familjuni. Helena sigur nakað sum er beinleiðis ósatt, umframt at hon niðurger mín persón. (mura)

Men, eg bíði framvegis eftir, at hon afturvísur tí eg havi sagt. Meðan eg bíði, kann eg tað sama afturvísa tí hon sigur.

Helena sigur, at Landið betalur lønir á Sambýlum, og tí er tað ósatt, sum eg havi skriva. Helena átti at vita, at Finnleif Guttesen, sum eg endurgav, úttrykkiliga tosaði um íløgur í nýggj sambýli. Tað hevði Helena eisini skilt, um hon gav sær tíð at lesa, og ikki gjørdi viðmerkingar í óðum verki. Harumframt skal sigast, at nú fleiri sambýlir eru bygd, og heimahjálpin er farin í tey at arbeiða, er í hvussu so er í okkara kommunu skorið tilsvarandi niður á heimahjálp í heiminum. Tí hevur landið, fyri at útreiðslurnar ikki skulu hækka, flutt heimahjálpirnar úr heimunum inn á sambýlir, við tí úrsliti, at fólk liggja óhjálpin heima.

Tá tú ikki hevur tíð at lesa uppá, krevst sera gott minni. Tað svíkur av og á hjá Helenu. Í øllum føri tá hon tosar um Sambýlið á Skála. Kunngerð um hetta frá 27 august 1998 er undirskriva av Helenu Dam á Neystabø. Sjóvar Kommuna fekk at vita frá ovasta embætismanni hjá Landsstýrismanninum, at kunngerðin skuldi lesast soleiðis, at fólk sluppu inn eftir tørvi. Metast skuldi fagliga um tørv. Tí hevur tað ongan tídning hvør eigur eitt sambýli.

Tá vit vóru útblaka av Skála, við hjálp frá Landsstýrinum, sum Helena var partur av, (Sí grein um hetta) umhugsaðu vit at byggja okkara egna. Tá fingu vit greitt at vita, frá heimahjálpini, at tey fingu ongar pengar frá Helenu, og tí kundu tey ikki seta starvsfólk í okkara Sambýli. So um Helena setti 1 mió meira av til heimahjálpina, hevði eitt nýtt sambýli møguliga verði bygt í hennara ministaratíð og 10 fólk, sum trongdu fingið innivist. Tí er tað Helena sum hevur alla skyldina av, at vit ikki hava eitt sambýli meira enn vit hava í dag. Men Helena gjørdi einki, og tí kundi Sjóvar Kommuna einki gera.

Tá Helena førur fram, at nú Skála og Runavík leggja saman verða vit við sviðusoð, vísur hetta bert, at Helena ikki dugir sínar egnu lógir. (Bústaður er órelevantur og almannalógin er líka fyri øll) Men hetta er ikki nakað nýtt. Tá Anfinn Kallsberg følur seg noyddan at taka eina støðu, er málið ógvuliga greitt.

Tá Helena kom í Landsstýri var tað Landið sum rak eldrasambýlið á Skála. Stutt eftir fingu vit kravboð um at vit skuldu yvirtaka Eldrasambýlið. Orsøkin var, at heimahjálpin ikki hevði pengar til at reka eldrasambýlið. Hesi kravboð fingu vit staðfest á fundi 16. November 1998. Um vit noktaðu bleiv eldrasambýlið stongt. Hetta var væl eftir boðum frá Helenu. Hvar var umsorganin fyri teimum gomlu?

Tá byrjaði kampurin um húsið á Skála. Hví skuldu vit gjalda, tá húsið er fyri alla Eysturoynna? Vit høvdu tey góðu argumentini, meðan Helena og hennara fólk høvdu maktina at taka avgerð, sum vit einki kundu gera við. Toppurin hevur altíð ábyrgdina, og tí var tað Helena, sum tveitti Sjóvar Kommunu út úr samstarvinum um Eldrasambýli á Skála. So at geva mær skyldina er langt við síðuna av, og prógvar bert, at Helena als ikki hevur skil á sínum málsøki.

**Moralur**
Merkir, sambært mínari Fremmedordbog: Indbegrebet af hvad der anses for rigtigt og sømmeligt mht. menneskers handle- og tænkemåde.

Tí tosa vit um moral, tá vit siga, at samsvar skal verða millum orð og gerðir. Hetta havi eg víst á manglar hjá Helenu. Tá onkur vísur á hesar manglar, ber ikki til at øsa seg upp, og umbera seg við at Eivind er minst líka ringur. Ein góður politikari hevur eina frágreiðing uppá, hví so er. Eg havi ikki viðgjørt Sjálvstýrisflokkin, men politikaran Helenu. Tá Helena sigur, at muran í undirritaða ikki er góð, tosar hon um mín persón. Eg fari ikki at viðgera persónin Helenu. Tað er privat. Moralin vísa vit á, og lata veljaran døma.

Tað er eftir mínari uppfatan grundleggjandi neyðugt, at politikarar hava góðan moral, og at samsvar er millum orð og gerðir. Tí er neyðugt, at vit lúka við jøvnum millumbilum.

Eg fari at geva Torbjørn Jacobsen rætt, tá hann sigur, at vit ikki hava brúk fyri livibreyðspolitikarum. Vit eru báðir (fyrrverandi) sjómenn, og tí vanir við 12 tímar arbeiðsdag. Hóast vit enn ikki hava fingið lykilin til vaskirúmið, rokni eg við, at báðir, saman við øðrum, fara at vaska innanfloks eftir næsta val. Og eg ivist onga løtu í, at vit um neyðugt bróta vakt fyri at hjálpa í øðrum flokkum, har tað treingir munandi meira til enn hjá okkum.

Tað sum vit hava brúk fyri eru menn og kvinnur, sum spyrja:” Hvat kann eg gera fyri Føroyar?” Til at stýra landinum krevst meira enn við himmalvendum eygum at beundra eitt spegl.

# Fróðskaparsetrið bjóðar alivinnuni á skeið um aling aling

Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum hevur sent alivinnuni innbjóðing um at luttaka í skeiði um aling, sum verður á Náttúruvísindadeildini eftir summarferiuni.

Skeiðið, sum er partur av lívfrøðisútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum, gevur eina grundleggjandi vitan um aling og tær fortreytir, ið skulu vera til staðar fyri at fá sum mest burtur úr hesi vinnuni. Evni sum verða gjøgnumgingin, eru grundleggjandi ting um alifisk og umhvørvi, smoltframleiðslu og framleiðsla av vaksnum fiski, kynbótararbeiði, sjúka og at enda hvørja ávirkan streymviðurskift hava á alingina.

Tað verður Hørður Wardum frá P/F Skretting sum kemur at taka sær av mesta partinum av undirvísingini, meðan Knud Simonsen frá Náttúruvísindadeildini fer at taka sær av tí partinum, sum hevur við streymviðurskifti at gera. Knud arbeiður m.a við at finna fram til nýggj aliøki. Hetta verður gjørt við útgangsstøði í einum streymmodelli, sum hann hevur gjørt fyri Føroyar.

# Djóragranskari vitjar

Ì hesum døgum hevur Náttúruvísindadeildin vitjan av Reinert Møbjerg Kristensen professara á Universitetinum í Keypmannahavn. Reinert Kristensen er her saman við 4 studentum.

Tey havan verið úti á Føroyabanka við Magnusi Heinason og tikið prøva av botninum til at kanna dýralívið. Nú sita tey í laboratoriunum á Náttúruvísindadeildini og kanna dýrini, tey hava funnið.

Hetta er ikki fyrstu ferð at Reinert hevur verið á Føroyabanka. Hann hevur verið har nakrar ferði fyrr, seinast í 1998. Tað sum hevur fangað hansara stóra áhuga, er skeljasandurin á botninum á bankanum. Ì millum sandkornini liva evarska smá bjarnadýr og korsettdýr, sum hann annars bert hevur funnið við Bermuda.

Eitt annað áhugavert projekt, sum Reinert arbeiður við, er at send bjarnadýr út í rúmduni, fyri at kannað hvussu tann kosmiska strálingini úti í rúmduni ávirkar livandi verur. Hetta hevur áhuga, tá finnast skal út av, hvaðani lívið á jørðuni hevur sín uppruna.

# Framsýningar í Tilhaldinum í Havn



ELDRATILHALDIÐ

Frá 3. juli til 17. august er Tilhaldið í Tórsgøtu í Havn opið mánadag til fríggjadag frá klokkan 14 til 18.

Á ólavsøku, 27., 28. og 29. juli frá klokkan 14 til 18 verður framsýning av listaverkum hjá Fridjof Joensen á 1. hædd, og í kjallaranum verður framsýning av úrvali av klæðum frá Sirri, og drekkamunnur og ábit verður at fáa, sigur Tilhaldið í tíðindaskrivi.

# Epileptikarafelagið nýggja nevnd

EPILEPTIKARAFELAG
*Tíðindaskriv*

5. juli hevði Epileptikarafelagið aðalfund í MBF-húsinum í Havn, og skipað nevndin seg við Randfríð Sørensen, Tórshavn, sum formanni. Næstformaður er Sólbjørn Jensen í Fuglafirði. Skrivari er Ása Østerø, Tórshavn, kassameistari er Elma Berg Danielsen, í Havn, og nevndarlimur er Mari Johannesen í Hoyvík. Sum tiltakslimir vórðu vald Gullberg Gullfoss, Hoyvík og Elisabeth Leo, Skopun.

Ú nevndini fór Annika Krossstein, ið bar seg undan afturvali.

Felagið hevði seinast í mars mánaði vitjan av Bjarka á Rógvu Hansen, neurologi á Ríkissjúkrahúsinum og Lene Sahlholdt, psykoneurologi frá Dianalund og møttu ein i 70 fólk fyri at hoyra tey siga frá um epilepsi, ymisk herðindi, heilivág og lívskvalitet.

Nevndin fer at arbeiða í komandi ári við at røkka meiri út á ø.kini runt um í landinum við onkrum tiltøkum, so sum okkurt fyri tey ungu, ið hava epilepsi. Eisini kemur kanska onkur uttanífrá at greiða meira frá um epilepsi. Ynski hjá nevndini er eisini, at fleiri epileptikarar vilja gerast limir í felagnum, sigur Epileptikarafelagið í tíðindaskrivi.

# Arngerð í Føroyahúsinum

LISTAFRAMSÝNING

28. juli kl 14 hevur Arngerð Joensen í Hoyvík fernisering í Føroyahúsinum í Keypmannahavn.

Arngerð Joensen sýnir fram málningar í olju, akryl og mixed media. Framsýninign er opin til 17. august.